hesar lærusveinarnar til valdsmiklar menn, sum í Guds kraft vendu allari heimssøguni á høvdið. Hvussu kann eg siga tað? Jú skriftin talar um hvussu teir hildu fram við at prædika Guds orð, og grøða menniskju og gera undur í Jesu navni.

**(Áp. 17,5-6)** Tá kom øvund á jødarnar, og teir tóku við sær nakrar óvandamenn av letingunum á torginum, fingu saman mannfjøld og loyptu røring í staðin; so hildu teir á hús Jasons og royndu at fáa fatur á teimum fyri at føra teir út til fólkið.

Tá teir ikki funnu teir, drógu teir Jason og nakrar brøður fram fyri býstýrið og róptu: „Hesir, sum hava endavent øllum heiminum, eru nú eisini komnir higar!“

Hvat var hent? Jú, teir tólv lærusveinarnir høvdu verið „hjá Jesusi“, og vóru nú fyltir við Heilaga andanum.

**(Áps 4,13)** Táið teir sóu, hvussu hugreystir Pætur og Jóhannes vóru, og dugdu at síggja, at teir vóru ólærdir og leikir menn, undraðust teir. Teir kendu teir aftur, at teir høvdu verið við Jesusi.

Men tá Guds ríki gongur fram, reisa aðrar kreftir seg eisini, men tá er gott at vita, at hesar eru yvirvunnar.

**Jesus sigur fylg mær!**

Tað eru somu orð Hann segði tá Hann kallaði lærusveinarnar.

**Jeremias 31,3-6** Úr fjarløgu hevur Harrin opinberað Seg fyri mær: „Ja, við ævigum kærleika havi Eg elskað teg; tí havi Eg drigið teg við náði. Eina ferð enn skal Eg byggja teg, og tú skalt verða bygd, tú moyggin Ísrael! Eina ferð enn skalt tú prýða teg við trummum tínum fara út í dansin við hinum glaðu. ***Eina ferð enn skalt tú planta víngarðar á Samariafjøllum; teir, ið planta teir, skulu eisini hava nýtsluna av teimum.***

Tí tann dagur kemur, tá ið vaktarar skulu rópa á Efra´imsfjøllum: „Komið, latið okkum fara til Zion, til Harran Gud okkara!”

Vit hava nógvar varðar í hesari samkomuni, og eru hesir varðarnir tey, ið gingu undan og slóðaðu vegin fyri teimum, ið eru komin aftaná. Eg trúgvi, at vit liva í eini tíð, har Harrin vil, at vit skulu koma aftur til tann fyrsta kærleikan.

Tað snýr seg ikki um hvussu vitug ella hvar í samfelagnum eg eri – alt snýr seg um Hann, sum gav Sítt lív fyri meg, og um eg vil stíga inn í tað, ið Hann hevur lagt fyri meg. Varðarnir eru vegvísarar, so at eg skal finna vegin fram til málið. Eg trúgvi veruliga, at vit eru komin har, ið Harrin kallar okkum aftur til Zion, har Hann kemur at ganga undan okkum í tí stóru veking, ið kemur at fara um allan heimin. At vit koma at vera ein partur av hesari veking.

Sum eg byrjaði við, skalt tú ikki óttast, tí tá tú hevur givið títt lív til Jesus, kann einki saka teg. Hvørji álop, ið enn koma á títt likam ella tína sál, kunnu ikki røra við tað, at tín andi er endurføddur.

Tað sum er innast í mínum anda, er millum meg og Jesus, og tað kann eingin nerta við.

Tá Jesus frelsti mína sál, flutti Hansara dýrd inn í mítt hjarta, og hvar enn eg eri og hvar enn eg fari fylgir tað við, ið Hann plantaði í mínum anda. Tað er einki og eingin, ið kann taka tað frá mær, tí tað er ímillum meg og Hann.

So lat okkum steðga við at ganga við niðurboygdum høvdi, og lat okkum síggja Guds stóru náði sum hon veruliga er.

*ÁO*

Filadelfia
*„Himmal á jørð“*

# *Aftur til tann fyrsta kærleikan*

Eg fari at byrja greinina við einari søgu, sum eg sjálv havi upplivað.

Talan var um eldri kvinnu, ið hevði fingið demens. Hon kendi ikki flestu avvarðandi aftur, men tá mann byrjaði at tosa um Jesus, var hon púra klár og við í prátinum. Hetta talaði nógv til mín, tí at hóast bæði likam og sál vóru ávirkað av sjúkuni, var andin ikki. Hetta sigur mær, at hvat so enn hendir við likami og sál, ávirkar tað ikki andan. Guds lyftir halda, í dag og til ævigar tíðir. Tað ið er ímillum meg og Jesus, hendir í andanum.

Um vit hyggja eftir myndini niðanfyri, vísir hon greitt samanhangin millum likam, sál og anda. Tá vit føðast av nýggjum, er tað ein andalig føðing.




***Jer. 31,21. sigur soleiðis:***
***Reis tær varðar, set tær vegvísarar, gev hinum lagda vegnum gætur – leiðini, ið tú gekst! Kom aftur moyggin Ísrael, kom heimaftur til býir tínar her!***

Vit hava hoyrt nógv og tosa nógv um ætt eftir ætt og vit tosa um samkomuna sum samkomufamiljan. Eg kom at hugsa um, hvussu teir varðarnir, ið eru komnir á mín veg, hava verið. Nakrir av teimum kann eg minnast aftur á við gleði, meðan aðrir hava verið meir ella minni rapaðir.

Havi hesa seinastu tíðina lisið og hugsað um teir fyrstu lærusveinarnar hjá Jesusi, hvussu teir vóru kallaðir.

Mangan trúgvi eg, at mann hevur havt eina fatan av, at Jesus bara er byrjaður at stilla Seg upp at tala og grøða fólk. Men eg trúgvi, at Jesus livdi eitt lív saman við fólki, og ávirkanin Hann hevði gjørdi, at fólk komu til Hansara. Teir tólv lærusveinarnir vóru vanlig menniskju, sum Gud brúkti á ein undurfullan hátt. Millum hesar tólv vóru fiskimenn, ein tollari o.l. Bíblian vitnar um tey mongu mitøkini, stríðini og ivamálini, sum hesir tólv lærusveinarnir hjá Jesusi Kristi stríddust við. (Hugsi tykkum, eisini teir stríddust).

Eftir at hava verið vitni til Jesu uppreisn og himmalsferð, umskapaði Heilagi Andin

# JUNI 2026

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anna-May |
| Mikudagur | 3. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 6. | | **Reingerð:** Mariann |
| | | Kl. 17.00 | **Guttaútferð til Gásadals** |
| Sunnudagur | 7. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Tummas J. |
| Mánadagur | 8. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anna |
| Mikudagur | 10. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Hósdagur | 11. | Kl. 20.00 | **Hugnakvøld fyri kvinnur** |
| Leygardagur | 13. | | **Reingerð:** Margreth |
| Sunnudagur | 14. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting og inns. til húsið** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II<br>Uppvørpa: Nóa<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Alex |
| Mánadagur | 15. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Mariann |
| Mikudagur | 17. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði við grill og vatnkríggi**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 20. | | **Reingerð:** No-omi |
| Sunnudagur | 21. | Kl. 11.00 | **Familju og grilldagur**<br>Møti- og kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Conny<br>Lovsongsleiðari: Bólkur I<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni |
| Mánadagur | 22. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anfinn |
| Leygardagur | 27. | | **Reingerð:** Merlie |
| Sunnudagur | 28. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møti- og kaffivertar: Gerd, Anfinn og Fríðbjørn<br>Ábyrgd/Leiðari: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Ása O. |
| Mánadagur | 29. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## Grilldagur 21. juni



Tann 21. juni verður familjumøti kl.11.00 við sangi, lovsangi og bíbliusøgu.

Aftaná møtið verður hugni, spøl og grill í skúlagarðinum aftanfyri Filadelfia. Gott um børnini kunnu hava uttanduraleikur við sum t.d. súklur, rennuhjól, bóltar, hoppibond o.a.

Okkara kokkar standa fyri grilluni og har verður alt gott at fáa og alt er tað ókeypis.

Vit gleða okkum til ein góðan dag saman.

Barnamøtini fara nú í summarferiu og byrja vit aftur 30. august.

Vit ynskja øllum eitt gott summar. *Vh Conny*